SERNÁMSDEPILIN

## Serráðgevi/ talilærari

### í Norðurstreymoy, Eiðis kommunu og eysturoyarbygdum í Sunda kommunu

Í Sernámsdeplinum er eitt serráðgevastarv leyst til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsstað:** Sum nevnt omanfyri, men kann verða broytt eftit umstøðum og tørvi.

**Arbeiðsøki:** Á leið ½ av arbeiðstíðini fer ætlandi til talilæraraarbeiði við børnum og ungum (0-18 ár), harí vegleiðing viðv. tiltøkum til málsliga menning hjá smábørnum.

Á leið ½ av arbeiðstíðini fer ætlandi til sernámsfrøðiliga ráðgeving til skúlar og foreldur/ avvarðandi at børnum við serligum tørvi.

Lagt verður til rættis í samráð við Sernámsdepilin og skúlaleiðarar/ stovnsleiðarar í økinum.

Uppgávurnar kunnu broytast eftir umstøðum og tørvi í mun til broytingar í sernámsfrøðiligu skipanini, ið Sernámsdepilin skal virka í.

**Arbeiðstíð:** Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Undirvísingartíð verður roknað eftir avtalu um arbeiðstíð hjá fólkaskúlalærarum.

**Løn:** Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, lønarflokkur 30 –1 til 32 – 2.

Fyri koyring við egnum bili ímillum skúlar/ stovnar verður endurgoldið kr. 2,90 fyri hvønn km.

**Førleikakrav:** Serlæraraútbúgvin fólkaskúlalærari við talu/ málmenning sum sergrein ella á annan hátt eftirútbúgvin serlærari við førleika til sernámsfrøðiliga ráðgeving og taliundirvísing/ málmennandi arbeiði. Audiologopedur við sergrein í lesing og pedagogiskum royndum er eisini skikkaður at søkja starvið.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum skal vera Sernámsdeplinum í hendi í í seinasta lagi fríggjadagin 23. mars 2007.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali-hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

Tórshavn tann 20. januar 2007

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Tlf. 314522 – Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

---

## Eysturoyar Røktar-og ellisheim

**Søkt verður eftir fysioterapeuti at byrja 1. apríl 2007 ella eftir nærri avtalu.**

Hevur tú hug at arbeiða fulla tíð ella í minsta lagi 0,75 tíð, ert tú vælkomin at søkja.

Stórur dentur verður lagdur á, at trivnaður bæði fyri búfólk og starvsfólk framvegis eyðkennir heimið og vænta vit tí av tær, at tú hevur áhuga og gleði við at samskifta við eldri fólk og at tú hevur vilja og eginleikar at samskifta við starvsfólk og avvarðandi.

Lønar og setanarviðurskifti eru sambært galdandi sáttmála.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ingelise Sørensen, fysioterapeut á tlf. 478200

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvi, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Eysturoyar røktar- og ellisheim**
att: fyristøðumaðurin
Friðartún
620 Runavík

**Umsóknarfreist 15. mars 2007**

---

## Reyði Krossur Føroya

### Delegatur/útsendingur

Randi Bjerre frá Dansk Røde Kors heldur fyrilestur týsdagin 6. mars kl. 16:00 – 17:30 og kl. 19:30 um treytirnar at gerðast

delegatur hjá Reyða Krossi, møguliga áhugaði kunnu fáa nærri vegleiðing.

### Skeið í sálarligari 1. hjálp:

8 tímar, kostnaður kr. 350,-

Leygardagar 10. og 17. mars kl. 13:00 – 17:00

### Aðalfundur

felagsins er lýstur til sunnudagin 18. mars 2007 kl. 15:00, Bryggjubakki 10, Tórshavn

Tey, ið ynskja at atkvøða, skullu hava goldið limagjaldi fyri 2007, ið er kr. 150,- /einstaklingar/ húski og kr. 400, - virkir/feløg.

Luttakari á aðalfundinum kann atkvøða við eini fullmakt.

*Giro 53252 ella konto í banka/sparikassa*

*Tlf. 319630/226625, Fax: 311217*
*Mail: redcross@redcross.fo*
*www.redcross.fo*

---

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

## Verkfrøðingur/ byggifrøðingur/arkitektur

(endurlýsing)

Til teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu er eitt starv sum verkfrøðingur/byggifrøðingur/ arkitektur leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur:**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja, eru:

- Útstykkingar
- Nýgerð og umvæling av vegum og kloakkum
- Havnabygging
- Útbygging og viðlíkahald av vatnverki
- Nýgerð og umvæling av kommunalum bygningum
- Byggimálsviðgerð

**Førleikakrøv:**
Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi/ arkitekti sum sjálvstøðugt kann arbeiða við projektering og eftirliti v.m. innan nevndu virkisøki.

Tekniarbeiði verður gjørt á MicroStation forriti.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknir saman við prógvum og upplýsingum um lívsroyndir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi **15. mars 2007 kl 16.00** á adressuni

**Fuglafjarðar kommuna**
Tekniska deild
Postboks 30
530 Fuglafjørður

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær Pætur Joensen, býarverkfrøðing, tlf. 444006, lokal 17, e-postur: patur@fuglafjordur.fo

**Fuglafjørður, 26. februar 2007**
**Fuglafjarðar býráð**

---

EYSTUROYAR TJÓÐVELDISFELAG

## Frá Eysturoyar Tjóðveldisfelag

Ársaðalfundur verður fríggjadagin 9. mars kl 19:00 í Glyvra Hanusar húsið í Norðragøtu.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Eysturoyar Tjóðveldisfelag**

---

## Støðdama

Søkt verður eftir støðdamu til Sp/f Bil og Mini-taxa í Tórshavn at arbeiða í vaktum.

**Tlf. 232414**

---

**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



VIVA